# Teitur umboðar danskan tónleik í Berlin



*Teitur er sambært danska tónleikaídnaðinum nóg spennandi til Popkomm*

**Tá tann mest týdningarmikli ídnaðarfestivalurin í Evropa fer av bakkastokki í september ,verður tað við føroyskari luttøka, danski tónleika ídnaðurin hevur valt Teit at umboða seg á Popkomm**

TÓNLEIKAVINNA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Teitur verður eitt av teimum fimm nøvnunum, ið skulu umboða danska ríkið á stóra ídnaðarfestivalinum Popkomm í Berlin í døgunum 20.-22. september í ár. Stjórin í Norðurlandahúsinum Niels Halm eigur ein stóran leiklut í luttøkuni hjá Teiti, og hann leggur ikki fingrarnar í millum, tá hann tosar um støðuna hjá Popkomm, ið hann metur vera tann mest týdningarmikla ídnaðarfestivalin í Evropa. ”Popkomm hevur størri handilsligt potentiali enn eitt nú Cannes”, sigur Niels Halm og vísir á, at meðan festivalurin i Cannes snýr seg um tey, ið eru stór í dag, so snýr Popkomm seg um bólkarnar, ið gerast stórir um nøkur ár.

### Tónleikur sum vinna

Almenna Danmark brúkar nógvan pening og orku uppá at luttaka á hesi messu. Hetta verður gjørt fyri at menna tónleik, sum útflutningsvinnu. Í fjør spældu m.o. Nephew, Carpark North og Kashmir á messuni. Í 2004 arbeiddi Niels Halm sjálvur, við at samskipa danska tiltakið á messuni, so hann kennir væl til týdningin, ið henda messa hevur í tónleikaídnaðinum. Hetta hevur eisini givið honum nógv sambond, ið nú hjálpa við at fáa føroyskan tónleik fram. Niels Halm greiður frá, at Norðurlandahúsið hevur arbeitt miðvíst við at fáa føroyska luttøku á festivalinum alt seinasta árið. Tey hava roynt at fingið bæði Teit, Eivør og fleiri aðrar føroyskar bólkar á skránna, “Men hetta eru kræsin fólk, og einans Teitur slapp gjøgnum nálareyga, sigur Niels Halm. Spurdur, um man kann tosa um “einans ein føroyskan luttakara”, tá danska luttøkan einans telur fimm bólkar, sigur Niels Halm, at vónirnar eru, at gera ein veruligan føroyskan pall á Popkomm einferð í framtíðini. Hann sigur, at hetta verður ikki, uttan so, at týsku fyrireikararnir ynskja tað, og her kann luttøkan hjá Teiti verða eitt stig á vegnum.

### Veruligur handilsskapur

Niels Halm sigur, at tey frá ídnaðinum, ið luttaka á festivalinum eru tey, ið veruliga hava áhuga í at vitja festivalin. Her er ikki so nógv talan um glitur og annað tílíkt hóvasták, men heldur um veruligan handilsskap innan tónleikaídnaðin. Her verða nøvnini funnin, ið ídnaðurin fer undir at satsa uppá komandi árini.

Luttøkan hjá Teiti á Popkomm er seinasta úrslitið av arbeiðinum hjá Norðurlandahúsinum við at skapa áhuga fyri føroyskari mentan uttanlands, onnur dømi eru m.a. AME konsertirnar í Reykjavík og Keypmannahavn og luttøkan hjá føroyskum bólkum á Spotfestivalinum.

### G! Festivalurin hevur fingurin á pulsinum

G!Festivalurin hevur eftir øllum at døma framúr gott innlit í hvørji nøvn verða tey stóru í framtíðini, tí ikki færri enn trý av nøvnunum, ið umboða danska ríkið á Popkomm verða at hoyra á ársins festivali, ið fer av bakkastokkið hóskvøldið. Umframt Teitur, verða eisini Infernal og Outlandish við á Popkomm. Eisini luttaka Spleen United og Powersolo.

---

# Heimsnøvnini hittast á G!

**Einar Már Gudmundsson, Johan Harstad og Thomas Boberg verða millum nøvnini, ið leygardagin luttaka á bókmentaløtuni á ársins G!Festivali**

FESTIVAL SUMMARIÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

G!Festivalurin er annað enn bert tónleikur, festivalurin kunngerð í dag fleiri heimskend nøvn innan bókmentir á stórslignum norðurlenskum bókmenta tiltaki. Við umboðan av so stórum norðurlenskum nøvnum innan skaldskap sum Einar Már Gudmundsson, Johan Harstad, Thomas Boberg, umframt unga íslendska høvundin Eirík Ørn Norðdahl og føroyingarnar Jóanes Nielsen, Carl Johan Jensen, Kim Simonsen og Vónbjørt Linjonsdóttir. Tiltakið er fyriskipað í samstarv við Outsider Magazine.

Vónbjørt Linjonsdóttir, ið samskipar tiltakið fyri G!Festivalin sigur við Sosialin, at tað er orsakað av góðu sambondinum hjá Kim Simonsen og Outsider Magazine við norðurlensku høvundarnar, at tað hevur eydnast at skapa eina so spennandi skrá. G!Festivalurin er nógv annað enn tónleikur sigur Vónbjørt Linjonsdóttir, og við bókmentatiltakinum verður ein roynd gjørd at seta fokus á orðið. Tílík tiltøk verða javnan fyriskipaði á tónleikafestivalum uttanlands, og eitt nú Roskilde Festivalurin hevur havt góðar royndir við tílíkum.

Vónbjørt Linjonsdóttir er einasta kvinnan á skránni og somuleiðis rithøvundurin við minstu skaldsligu royndunum á tiltakinum. Hon leggur heldur ikki skjól á, at hennara kyn eigur stóran leiklut í hennara luttøku. Hon sigur, at av tilvild vóru einans mannfólk á skránni, og tí avgjørdu fyriskipararnir at skapa eitt sindur av kvinnuligari mótvekt, við at lata Vónbjørt lesa yrkingar sínar.

Á tiltakinum verið høvið at hoyra upplestur av brotum úr skaldsøgum og yrkingum, umframt samrøðu millum Kim Simonsen og Johan Harstad.

Tiltakið verður í backstage hølunum í Syðru Gøtu, tey ið hava armband til G!Festivalin sleppa ókeypis inn, men onnur kunnu eisini luttaka við at keypa atgongumerki á 50 kr. við dyrnar.



*Einar Már Gudmundsson fer at lesa nýggjar yrkingar og brot úr skaldsøgu á bókmentaløtuni á G!Festivalinum*

### Stutt um rithøvundarnar

Johan Harstad (f.1979) er ein av kendastu prosahøvundunum í Noreg í dag. Hann fekk eitt stórt altjóða gjøgnumbrot við triðju bók síni skaldsøguni ”Buzz aldrin hvor ble det av deg i alt mylderet?” Bókin verður nú týdd til fleiri enn 10 mál, og er vorðin ein bestseljari.

Einar Már Gudmundsson (f. 1954) er kanska hin kendasti núlivandi høvundin í Íslandi í dag. Hann er kendur fyri at skriva søguna hjá norðurlendsku undirstættini. Kendar eru t.d. ” Fotspor a Himnum”, “Draumar á jörðu”, “Nafnlausir vegir” frá 1999 og 2000. Hann fekk Bókmentavirðisløn Norðurlandsráðsins í 1995 fyri skaldsøguna Alheimsins Einglar, ið er týdd til føroyskt.

Thomas Boberg (f. 1960) er kendur fyri sínar yrkingar, men kanska mest fyri ferðabøkurnar ”Sølvtråden”, ”Americas” og ”Invitation til at rejse”. Yrkingarháttur hansara hevur nógv til felags við spanska og suðuramerikanska yrking. Thomas Boberg var í ár í uppskoti til Bókmentaheiðursløn Norðurlandaráðsins.

Eiríkur Ørn Norðdahl (f. 1978) er av Ísafirði á Vestlandinum í Íslandi. Eiríkur hevur útgivið trý yrkingasøvn og skaldsøguna ”Hugsjónadruslan”. Hann hevur týtt bæði Ginsberg og Michael Moore til íslendskt. Harumframt skipar hann fyri bókmentafestivalum og hevur verið við til at stovna yrkjarabólkin Nýhil, ið hevur sett dagsskránna innan íslendska yrking seinastu árini.

Jóanes Nielsen (f. 1953) hevur fýra ferðir verið í uppskoti til Bókmentaheiðursløn Norðurlandaráðsins, og fyri sjónleikin ”Eitur nakað land Weekend?” vann hann Norðurlendsku Dramatikaraheiðurslønina. Hann hevur útgivið skaldsøgur, yrkingasøvn og greinasøvn síðan síðst í 70’árunum.

Carl Jóhan Jesen (f. 1957) úttalaði sjálvur, at skaldsøgan ”Ó” var eitt tað týdningarmesta føroyska verkið seinastu 40 árini – og ummælararnir høvdu lyndi at geva honum rætt. Carl Jóhan Jensen hevur útgivið yrkingasøvn og skaldsøgur síðan síðst í 70’árunum og var í uppskoti til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið ”Tímar og rek.”

Kim Simonsen (f.1970) er kendur sum blaðstjóri, ummælari og bókmentafrøðingur og sum ein av okkara virknastu viðmerkjarum og ummælarum. Hann hevur givið savn av greinum út, Dreymar um opin vindeygu, og yrkingasøvnini Kodakmyndir frá sjeytiárunum og Náðisólin.

Vónbjørt Linjonsdóttir (f. 1974) debuteraði sum yrkjari í Outsider Magazin 2-3 við yrkingini ”Kvirra”, og útgevur í næstum stuttsøgu í einum savni hjá Skúlabókagrunninum, sum kemur út í heyst. Hon starvast í løtuni sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni.